Tað sum ikki varð sagt á hátíðarhaldinum hjá útvarpinum:

# Einsrætting sum í Russlandi – fyrr

ÓLI JACOBSEN



Eg eri ein av teimum, sum havi lurtað eftir útvarpinum frá fyrsta degi, og sum saktans kann ynskja tillukku við 50 ára degnum. Eg luttók enntá í eini barnasending longu í 1957, tá Aksel Tórgarð kom á vitjan í skúlanum í Gøtu.

Eg havi eisini fylgt við gongdini í útvarpinum og lurti eftir stórt sæð hvørji einastu tíðindasending. Samstundis fylgi eg væl við í fjølmiðlaviðurskiftum uttanlands og kann tí sammeta.

### Bílagdur tíðindaflutningur

Eingin hevur í samband við hátíðarhaldið viðgjørt støðið á tíðindunum, sum er út av lagi vánaligt. Hetta er serliga galdandi fyri politiska tíðindaflutninginum, sum er merktur av einsrætting og dugnaloysi.

Stórt sæð kann sigast, at útvarpið virkar sum ein tíðindastova hjá politisku skipanini. Tað er henda skipan og ikki útvarpið sjálvt, sum stýrir tíðindunum.

Politisk tíðindi eru í høvuðsheitum bert endurgeving og ikki viðgerð av nøkrum slag. Hetta merkir, at politisk tíðindini stórt sæð bert eru grundað á innsend tíðindaskriv ella annað ”grýtuklárt” innsent tilfar, sum ókritiskt verður lisið upp, sum tað er skrivað.

Ein løgtingsmaður ella flokkur, sum vil sleppa í útvarpið, skal bert orða sær ein fyrispurning ella uppskot til tingið og faxa tað til útvarpið. So verður hetta lisið upp, sum um tað var journalistisk arbeidd tíðindi.

Ein nýggjur ”fidusur” er at senda síni lesarabrøv til útvarpið. So kann útvarpið presentera hetta sum sjálvframleidd tíðindi, áðrenn tey náa at koma í bløðini seinni um dagin.

### Manglandi almenn vitan og einki tankavirksemi

Afturat hesum kemur, at tað er hópur av dømum um, at í útvarpinum er stórur tørvur á almenna vitan. Hetta er nóg galið og er kanska úrslitið av, at føroyingar hava fingið ov nógv undantøk í upptøkuroyndunum til danska journalistháskúlan. Eitt annað úrslit er, at í útvarpinum finnast heldur eingi evni at meta um, hvørt tíðindi eri sannlík ella ikki, og hetta hevur sum úrslit púra skilaleysan tíðindaflutning.

Her skulu bert verða nevnd nøkur dømi sum beint eru í huganum.

Ein morgun greiddi útvarpið frá, at oljuprísurin var hækkaður við 15%, sum vildi verið ein risahækking, sum sjáldan ella ongantíð hendir eftir einum degi. Hesi tíðindi verða endurtikin í øllum tíðindasendingunum tann fyrrapartin. Men tann, sum hevði sæð hesi tíðindi í donskum fjølmiðlum sama morgun, visti, at oljuprísurin var hækkaður við 15 centum, og hetta er nakað heilt annað, nevniliga minni enn 0,3%. Hetta er ikki annað enn tað, sum javnan hendir frá einum degi til annan.

Ein skuldi trúð, at við teimum 100 fólkunum, sum arbeiða í kringvarpinum, skuldi í minsta lagi verið eitt teirra, sum varnaðist, at her var okkurt, sum ikki ruggaði rætt og fekk tíðindini rættað, men tað var so eiðasørt í hesum sum í fylgjandi dømum.

Eitt annað dømi er tíðindini seinasta heyst um metingina hjá danska Tjóðbankanum av føroyska búskapinum. Samb. heimasíðuni hjá útvarpinum segði tjóðbankin, at ”høga veiðutrýstið eftir toski kann fáa ta avleiðing, at fiskiskapurin minkar og at prísirnir falla”.

Fyri fólki við minsta skili skuldi hetta sagt, at her var okkurt sum ikki ruggaði rætt. Spurningurin var bert, um teir á sjálvt tjóðbankanum kundu vera so skítbýttir, at teir halda, at minkandi fiskiskapur og harvið minkandi útboð eisini merkir lægri prísir, hóast tað er almenn vitan, at tað er mótsatt, ella um tað var útvarpið, sum er so eiðasørt í donskum, at tað ikki dugdi at lesa og týða vanligan danskan tekst.

Hetta varð skjótt staðfest við at hyggja at, hvat tjóðbankin veruliga hevði sagt. Her varð ikki sagt, at prísirnir fóru at falla við minni fiskiskapi, men at ”avkastið”, t.v.s samlaða úrtøkan fór at minka. Tað var nakað heilt annað. So frægt av tankavirksemi var ikki í okkara fremstu tíðindatænastu, at teir fangaðu hetta, og hesi vitleysu tíðindi standa framvegis á heimasíðuni hjá útvarpinum.

Triðja dømið er meira skemtiligt. Ein dagin kundi útvarpið boða frá, at danski flutningsmálaráðharrin Flemming Mikkelsen hevði svarað Høgna Hoydal einum spurningi í Fólkatinginum. Sakin er, at tað er grundleggjandi almenn vitan, at danski ráðharrin á økinum eitur Flemming Hansen. Men hinvegin er ein annar danskur ráðharri sum eitur (Brian) Mikkelsen. Samstundis er ein fyrrverandi løgtingsmaður í Vági, sum eitur Flemming Mikkelsen, og við ”logikkinum” hjá útvarpinum gjørdist danski ráðharrin ein navnabróður hjá Flemming Mikkelsen í Vági. Hetta stendur framvegis á heimasíðini hjá útvarpinum.

Hetta vísir bert, hvussu útvarpið er vant av við at hugsa sjálvstøðugt, og at tað finst einki tankavirksemi, sum loftar slíkum innlýsandi mistøkum.

### Útvarpið sum fjórða statsmakt

Sosialurin hevði seinasta vikuskifti eina samrøðu við Høgna Hoydal um fjølmiðlar og politikk. Her sigur HH m. a.: Føroyskir journalistar eru alt ov autoritetstrúgvir. Tess hægri persónurin er í politiska hiarkinum, tess minni kritisk viðgerð. Ein løgtingsmaður og ein landsstýrismaður kunnu siga nærum hvat sum helst uttan mótspæl og uttan at verða avdúkaðir.

Hetta er so rætt sum tað er sagt. Men tað skal skoytast uppí, at er tað ringt, tá tað snýr seg um sitandi samgongu, so er tað minst líka ringt tá tað snýr seg um Høgna sjálvan og ikki minst, tá hann sat í landsstýrinum.

Fekk brot við í sendingini ”62 norður” týsdagin, har Jógvan Jespersen var gestur. Her vórðu lisin upp sjónarmið hjá Høgna Djurhuus, útvarpsmanni, sum bóru á sama borð sum hjá Høgna Hoydal og mær sjálvum.

Spurdur um útvarpið sum ”fjórðu statsmakt”, ella sum varðhundur móti politisku skipanini, slerdi JJ nærum knút á seg sjálvan fyri at sleppa undan at svara. Tað kom tó greitt fram, at her skuldi eingin vænta sær nakað frá hansara síðu.

Tað er heldur eingin, sum hevði væntað sær nakað annað svar. Tað hevur leingi verið greitt, at fremsta uppgávan hjá útvarpinum er at tekkjast politisku skipanini. JJ veit, at flokkar og løgtingsmenn ongan áhuga hava fyri innihaldið í tíðindunum. Tað, teir meta útvarpið eftir, er, at teir sjálvir ikki verða fyri vanbýti í mun til aðrar flokkar í tíðindaflutninginum. Samstundis skal ongum í toppinum av hiarkinum gangast ov nær. Eitt úrslit av hesum hugburði er, at teir í útvarpinum kunnu saktans t.d. hava klandur í tjóðveldisflokkinum sum tíðindi. Men embætisførslan hjá Høgna var og er friðað!

Grundleggjandi prinsippið er, at sigur løgtingmaður A at B lýgur, verður tað endurgivið sum tað er bílagt. Sigur B hinvegin, at tað er A, sum lýgur, verður tað somuleiðis endurgivið og báðir er tilfriðs. Men tað er einki sum eitur at fara at kanna hvør tað er sum lýgir, tí so verður annar firtin, og tað má ikki henda.

JJ hevur sjálvur lýst hetta prinsipp í brævi til umboðsmannin í 2002, har hann m.a. segði:

”Vanligt er ikki at eftirkanna sannleikavirði í tíðindaskrivum” hjá politikkarum. Eitt er, at hetta gongur sjón fyri søgn. Eitt annað er, at vit hava ein almennan kringsvarpsstjóra sum hevur eina ullintan hugburð til sannleikan og enntá boðar frá tí sjálvur.

Jógvan Jespersen hevði neyvan sitið dagin á tamb í einum skipaðum samfelag, sum t.d. Danmark ella Bretland.

Men her í Føroyum situr hann tryggur. Fyrst hevur undanfarni umboðsmaður blástemplað hendan hugburðin til sannleikan, og hetta er júst ein hugburður, sum politiska skipanin hevur brúk fyri, so hon kann fáa frið fyri ”síni” pressu.

Tíðindini eru eisini har eftir. Tað nærmasta, sum nakað blað hevur verið eini fjórðu statsmakt seinastu árini, er FF-blaðið, sum í hvussu er ikki hevur spart teir ovast í politiska hiarkinum hjá Høgna.

Tann, ið fylgir við, veit, at útvarpið stórt sæð eingi politisk tíðindi framleiðir sjálvt. Talan er bert um endurtøkur frá øðrum eins einsrættaðum fjølmiðlum. Men takkað verið boðum frá Jógvan Jespersen sjálvum, og eftir, at eg hevði funnist at útvarpinum, varð FF-blaðið stórt sæð ikki tikið uppá tungu í útvarpinum sum tíðindakelda. Ikki eitt tað einasta av okkara ”fjórðustatsmakt” sjónarmiðum varð yvirhøvur nevnt. Blaðið varð stórt sæð ikki umrøtt, fyrr enn tað helt uppat.

Spurningurin um fjórða statsmakt hjá útvarpinum er slett ikki ein spurningur um játtan, útbúgving ella fleiri fólk til arbeiðis.

Hetta er fyrst og fremst ein spurningur um hugburð.

Hjá útvarpinum er hugburðurin fullkomiliga greiður. Hann er at tekkjast teimum ráðandi! ”Tað er so nogv lettari”, sum tað plagar at verða lýst fyri V4.

# Er Navision skipanin keypt í heimildarloysi?

HERGEIR NIELSEN
Løgtingsmaður



Undir orðaskiftinum um Landsroknskapin fyri 2005 varð nógv gjørt burturúr Búskaparskipan landsins (BL).

BL, er ein føroysk skipan, sum er ment seinastu tíggju árini í so góðari dygd, at hon er kend uttanfyri landoddarnar.

Spurdur undir viðgerðini á tingi, visti landsstýrismaðurin í fíggjarmálum at siga, at hann ikki hevði givið nøkrum stovni loyvi til at brúka aðra skipan enn BL.

Sambært lóg er tað landsstýrið, ið ásetur reglur um roknskaparhald landsins, og í kunngerð er harafturat ásett, at allir stovnar hava skyldu til at nýta BL.

Kortini kann fíggjar- og búskapardeildin eftir umsókn loyva stovnum við serligum tørvi at nýta aðrar búskaparskipanir.

Soleiðis sum lóg og kunngerð eru orðaðar, kann eingin stovnur uttan loyvi frammanundan loyva sær ein túr inn í nethandlarnar at keypa sær sínar egnu skipanir.

Vit, sum eygleiða støðuna, ansa eftir, at ein almennur stovnur heldur seg hava serligan tørv á serligari skipan, og vit vita, at um so skal vera, so skal hann hava serligt loyvi frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum til endaálið.

Hesin landsstýrismaður segði seg undir orðaskiftinum ikki at hava givið hetta loyvið.

Rætta viðkomandi í Tinganesi fingu vit ikki orðið á undir vigerðini av landsroknskapinum, men kanska tað eyðnast í øðrum umfari, nú tað brimar upp í klettin undir landsstýrismanninum í Vinnumálum.

Onsdagin 7. februar kálvar Sosialurin í oddagrein eina niðurstøðu um, at BL er ótíðarhóskandi og óbrúkilig, og ikki sæst blaðið hava tosað, hvørki við Fíggjarmálaráðið ella Gjaldstovuna, sum bera ábyrgdina av skipanini.

Hvørji samfeld áhugamál Sosialurin og Vinnumálaráðið hava í at dylja týdningarmiklar upplýsingar í dagførdum roknskapum, felags kontoskipanum, játtanar- og roknskaparreglum, KT-trygd, gjaldføri og gjøgnumskygni, ja, tað vita vit ikki.

Talan er um at skulka sær undan sjálvari stýringini av fíggjarkervinum, sum tey kønu halda vera eitt av allar størstu framburðunum hjá føroyskari fyrisiting hesi seinastu 10 árini, ið skipanin er ment til almikið gang fyri landbúskapin.

Her eru vit so inni við kjarnuna í málinum, tí eingin almennur stovnur hevur loyvið til at fáa sær aðra skipan, fyrrenn loyvið til tess er givið av fíggjarmálaráðnum.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, fær tí henda munnliga fyrispurning í tinginum, onsdagin 21. februar 2007.

“Heldur landsstýrismaðurin, at keypið av Navision skipanini er fevnt av § 4, stk.5 í kunngerð nr. 114 frá 22. august 1996,um roknskaparverk landsins, og er skipanin eitt neyðugt forskoyti til Búskaparskipan Landsins?”

Roknað verður við, at landsstýrismaðurin kunnar løgtingið neyvari um ta støðu, sum er íkomin, síðan ein ella fleiri almennir stovnar eru farnir at brúka aðrar skipanir enn Búskaparskipan Landsins.

Nær er umsókn um Navision skipanina komin fíggjarmálaráðnum í hendi, er hon játta av Ráðnum, og nær er hon sett í verk?

Hvussu stórur er keypskostnaðurin fyri hesa skipan, hvussu stór er nýtslan higartil, og hvat kostar skipanin restina av fíggjarárinum?

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.